# ítróttur

Nr. 172 • leygardagur • 10. september 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

HB-GÍ:

## So skal Julian royna seg

**Tríggir týdningarmiklir spælarar resta í hjá HB, tá teir sunnudagin skulu royna at venda skútuni, so FM-kósin aftur fæst á beint**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*



*Nú eru ráðini ikki til at tapa meira í HB. Fyrsta av seks »finalum« verður sunnudagin, tá GÍ vitjar í Gundadali*

Seinastu tíggju dagarnar hevur Julian Hansen koyrt á HB-spælararnar. Sum skilst, so hevur lagið í hópinum verið gott, men eitt er venjing. Nakað annað eru týðandi dystir har týðandi stig standa upp á spæl, og í so máta er fyrsta sveinaroyndin hjá Julian og spælarunum sunnudagin.

Og liðformaðurin hjá liðnum, Rúni Nolsøe, ásannar eisini, at nú er tað álvari í.

- Vit hava í øllum førum ikki ráð at tapa meira. Fyri okkum eru tað bara sigrar, sum kunnu brúkast til nakað, um vit vilja vera við í toppinum. Og tá kunnu vit framvegis ikki avgera alt sjálvir. So tað ræður um at taka ein dyst í senn og trý stig í senn, sigur Rúni.

Og sum so kann HB kanska finna sær nakað av inspiratión í, at tað júst er GÍ, sum nú er mótstøðuliðið. Tá HB í 2002 skifti venjara í úrtíð, var fyrsti dysturin hjá nýggju venjarunum móti júst GÍ. Og tann royndin eydnaðist sum kunnugt rættiliga væl.

Tað verður tó eitt nakað skert HB-lið, sum fer á vøllin. Hans á Lag og Jóhannis Joensen hava seinastu tíðina havt trupulleikar við skaðum, og tað kann í ringasta føri merkja, at teir ikki eru tøkir aftur í ár. Jóhannis byrjaði kanska nakað tíðliga aftur eftir sín skaða, tá HB tapti á Eiði, og Hans hevur aftur fingið trupulleikar í knæið. Hartil hevur Tór-Ingar Akselsen trupulleikar við liðbondunum í øðrum knænum.

Hjá GÍ er setningurin framvegis at halda sær í bestu deildini. Eitt mál sum enn ikki er rokkið við vissu. Hesa ferð mugu teir vera Hans Jørgen Djurhuus fyriuttan, eftir at reyða kortið, sum hann fekk móti KÍ. Hartil er Poul Arni Jacobsen úti við skaða.

## Býráðið hjálpir Tórsvølli

**Borgarstjórin váttar, at samráðingar eru í gongd um, hvussu Býráðið kann lættu um hjá Tórsvølli. Men talan verður ikki um stuðul til raksturin, sigur Heðin Mortensen**

TÓRSVØLLUR
*Jákup Mørk*

Í blaðnum í gjár staðfesti Poul Michelsen, at hóast trupulleikar hava verið við grasinum á Tórsvølli í ár, so er ikki so einfalt at loysa hesar. Ikki minst, tí fíggjarorkan hjá grunninum ikki røkkur til størri ábøtur. Eitt nú at skifta grasteppið.

Tað er Tórshavnar Býráð, sum í seinasta enda stendur við ábyrgdini fyri Tórsvøll, og har verður ásannað, at grunnurin hevur eina trupulleika, tí inntøkurnar eru í minna lagi.

Ein møguleiki, sum onkra tíð hevur verið nevndur, er at kommunan snøgt sagt flytir raksturin úr grunninum og í kommunukassan, men hesum møguleikanum er borgarstjórin, Heðin Mortensen, ikki serliga heitur fyri.

- Tað liggur eitt ótrúliga stórt sjálvboðið arbeiði í grunninum, og tí eri eg ikki so vísur í, at tað vildi verið nøkur góð loysn. Hinvegin, so er tað ein sannroynd, at grunnurin ikki hevur serliga nógvan pening at arbeiða við, og at orkan til íløgur og viðlíkahald tí er avmarkað.

*Vil tað siga, at tit umhugsa at lata grunninum stuðul til raksturin?*

- Nei. Men hinvegin kann Býráðið í aðrar mátar hjálpa til. Eg kann siga, at vit í løtuni er í samráðingum við grunnin um, hvussu vit kunnu betra um karmarnar, soleiðis at betri rentabilitetur fæst í raksturin. Og her verður fyrst og fremst hugsað um íløgur. Har liggur jú eisini ymiskt annað í kortinum, soleiðis at Tórsvøllur í enn størri mun kann gerast ein depil fyri allari ítrótt. Eitt nú hevur verið tosað um at gera fimleikahallir við vøllin, sigur Heðin Mortensen.

Hann leggur tó dent á, at talan verður ikki um nakrar veldugar íløgur í sjálvan Tórsvøll, men heldur fast um, at Býráðið er sinnað at hjálpa til.

- Størri íløgur haldi eg ikki, at býráðið kann loyva sær í løtuni. Tað eru aðrar ítróttargreinar, sum standa longur frammi í røðini nú, og her hugsi eg serliga um fimleikin og frælsa ítróttin, sigur Heðin Mortensen at enda.

### Dystir um vikuskiftið

**Formula-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 11.09 | ÍF-VB | Eiler Rasmussen |
| 11.09 | KÍ-Skála | Georg N. Rasmussen |
| 11.09 | HB-GÍ | Jens P. Brattalíð |
| 11.09 | NSÍ-EB/S | Páll Augustinussen |
| 11.09 | TB-B36 | Dagfinn Olsen |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 10.09 | AB-Royn | Jónleif Frederiksen |
| 10.09 | LÍF-B36 | Hans F. Hansen |
| 10.09 | GÍ-FSV04 | Rúni Gaardbo |
| 10.09 | HB-B71 | Milan Cimburovic |
| 10.09 | Sumba-B68 | Dan Højgaard |

**3. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 11.09 | EB/S-Fram | Jan á Líðarenda |
| 11.09 | VB-SÍ | Mihai Matia |
| 11.09 | NSÍ-B68 | Jón S. Gleðisheygg |
| 11.09 | Skála-KÍ | ÍF |
| 11.09 | HB-ÍF | AB |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 11.09 | AB-B36 | B71 |
| 11.09 | FSV04-GÍ | SÍ |
| 11.09 | KÍ-EB/S | LÍF |